# Tveir favorittar



*Stjørnan tykist í vetur hava ætlanir um at elta VÍF, og liðið eigur avgjørt at fáa fulla úrtøku úr dystinum móti Kyndli*

**Bæði Stjørnan og VB eru stórir favorittar, tá kvinnurnar sunnudagin seta hol á næsta fjórðingin av hondbóltskappingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Bæði Stjørnan og VB tykjast í ár hava ætlanir um at elta meistararnar úr VÍF, og tey kunnu bæði toga seg eitt fet longur upp á stiganum, tá tær sunudagin skulu royna seg.

Í Havn kemur Stjørnan á vitjan hjá Kyndli, og her er einki at ivast í, at Stjørnan er greiður favorittur. Gaman í stóð Kyndil seg væl í Klaksvík, men umframt at talan tá var um fyrsta dystin á árinum, so vóru klaksvíkingarnir rættiliga skerdar tann dystin, tá fleiri av leikarunum vóru staddar uttanlands. Nú er støðan við fólki heilt øðrvísi. Úrslitini hava eisini verið heilt góð, og sæð í mun til vánaligu gongdina hjá Kyndli, so er einki at ivast í, at Stjørnan er risa stórur favorittur í dystinum sunnudagin.

### Sóljan í framgongd

Tað sama má eisini sigast um VB, sum um sama mundi fær vitjan av Sóljuni. Vágagellurnar skulu aftur í ár stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting, og tó at úrslitini hava boðað frá einari framgongd í ár, sæð í mun til undanfarna ár, so skal tó hampuliga nógv til, um tær skulu skala VB á heimabeiti.

### Støðan 1. Deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 6 - 0 - 0 | 185 | 110 | 75 | 12 |
| 2 | Stjørnan | 6 | 5 - 0 - 1 | 171 | 130 | 41 | 10 |
| 3 | Neistin | 6 | 4 - 0 - 2 | 145 | 123 | 22 | 8 |
| 4 | VB | 6 | 3 - 0 - 3 | 142 | 146 | -4 | 6 |
| 5 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 137 | 171 | -34 | 2 |
| 6 | Sóljan | 6 | 1 - 0 - 5 | 127 | 170 | -43 | 2 |
| 7 | StÍF | 6 | 1 - 0 - 5 | 109 | 166 | -57 | 2 |

### Støðan 1. Deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 6 | 5 - 1 - 0 | 179 | 140 | 39 | 11 |
| 2 | Neistin | 6 | 5 - 1 - 0 | 167 | 151 | 16 | 11 |
| 3 | StÍF | 6 | 3 - 0 - 3 | 159 | 156 | 3 | 6 |
| 4 | H71 | 6 | 3 - 0 - 3 | 162 | 165 | -3 | 6 |
| 5 | Tjaldur | 6 | 1 - 1 - 4 | 142 | 155 | -13 | 3 |
| 6 | KÍF | 6 | 1 - 1 - 4 | 147 | 170 | -23 | 3 |
| 7 | Kyndil | 6 | 1 - 0 - 5 | 140 | 159 | -19 | 2 |

### Støðan, meistaradeild kvinnur

| Støðan Lið | leiktir | Dystir vunnir | taptir | vunnin | Sett tapt | munur | * Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| TB | 4 | 3 | 0 | 12 | 1 | 11 | 8 |
| Dráttur | 4 | 2 | 2 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| ÍF | 4 | 2 | 4 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| Mjølnir | 4 | 1 | 3 | 6 | 10 | -4 | 2 |
| Fleyr | 4 | 1 | 3 | 4 | 11 | -7 | 2 |

### Støðan, meistaradeild menn

| Støðan Lið | leiktir | Dystir vunnir | taptir | vunnin | Sett tapt | munur | * Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fram | 4 | 4 | 0 | 12 | 6 | 6 | 8 |
| SÍ | 4 | 3 | 1 | 10 | 4 | 6 | 6 |
| Mjølnir | 4 | 2 | 2 | 8 | 8 | 0 | 4 |
| Fleyr | 4 | 1 | 3 | 6 | 9 | -3 | 2 |
| ÍF | 4 | 0 | 4 | 3 | 12 | -9 | 0 |

# Oddaliðini hava frí

**Øll trý oddaliðini í bestu mansdeildini hava frí hetta vikuskiftið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*



*Tjaldursmenn tóku øll á bóli, tá teir vunnu á StÍF, og nú kunnu teir førka seg enn longur frá botninum*

Tveir dystir verða í bestu mansdeildini hetta vikuskiftið, og tað liggur í øllum førum fast, at støðan í oddinum ikki verður broytt eftir hesar.

Í øllum førum verður eingin broyting millum tey bæði ovastu liðini, men tað er tó væl hugsandi, at nýtt lið er á triðjaplássinum sunnudagin. H71 má í hvussu so er metast sum favorittur, tá teir fríggjakvøldið eftir evstamark okkara fara til Vestmanna, har teir skulu royna seg ímóti KIF. Hoyvíkingar hava styrkt sær munandi um liðið til hetta kappingarárið, og ætlanin miðjar helst móti einum plássi, sum er ovarligari enn tað fjórða plássið, sum teir í løtuni eru á, og um hetta skal røkkast, so krevst altso ein sigur ímóti kollfirðingum.

Kollfirðingar hava hinvegin prógvað, at teir ikki skulu takast sum nøkur løtt uppgáva, tí hóast talan enn bert er um ein sigur fyri teirra viðkomandi, so hevur tað fleiri ferðir verið heilt nær við kortini.

### Botndystur í Havn

Tað man vera langt síðani, at Kyndil hevur verið partur av einari botnuppgerð, men teir eru nú í teirri óvandu støðu, at teir kunnu verða isoleraðir í botninum, tá sunnudagurin er farin aftur um bak.

Í løtuni liggja teir á aftasta sessinum, og mótstøðuliðið sunnudagin er næst niðasta liðið á stigatalvuni, Tjaldur, sum fyri viku síðani tók øll á bóli, tá teir vunnu uppibornan sigur á StÍF.

Sum nevnt í vikuni, so er Kyndil eisini í teirri torføru støðu, at fleiri av stuðulsleikarunum í løtuni eru skaddir, og so er spurningurin, hvussu Jónleif Sólsker fer at blanda sær kortini.

Tó at størsti trupulleikin hjá Tjaldri helst eisini er, at leikarahópurin er í minna lagi. Hinvegin er einki at ivast í, at er talan ikki um skaðar, er talan um eitt hampuliga sterkt lið, og nú orkan eisini tykist vera komin í rættlag, er einki at ivast í, at Kyndil fer at fáa sera dygga mótstøðu sunnudagin. Ja, helst er hon somikið stór, at Tjaldur verður í óvanda leiklutinum sum favorittur.



